


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 04 - 2012

# Aftur boð eftir føroyingum at gera kinesiskan oljupall lidnan

So mikið væl varð arbeiðið hjá føroyskum handverkarum, sum Pam Offshore í fjør sendi til Kina at sigla boripallin Cosl Innovater (systurpallur til Cosl Pioneer, sum skal bora í føroyum í summar), fráingið, at tað nú aftur eru boð eftir føroyingum at gera enn ein nýggja pall lidnan. Flaggdagin var dópur og avhandan av nýggjasta boripallinum hjá COSL Drilling Europe. Í tí sambandinum var skipað fyri hátíðarhaldi á CIMC Rafflers skipamiðjuni í Yantai, Kina. Umborð á COSL Promoter flaggdagin vóru sjey mans frá PAM Offshore Service, fimm elektrikarar og tveir sveisarar. Boripallurin er um at vera klárur til fráferð og verður hann helst endaliga yvirtikin av COSL tann áttanda mai. Fráferðin er fyribils sett at vera tann fjúrtanda mai. Leiðin heim til Europa verður tann sama sum teir báðir fyrru pallarnir hjá COSL, Pioneer og Innovator hava tikið umvegis Singapore, Mauritius, Port Elisabeth og Las Palmas. Við á fyrsta teininum frá Yantai til Singapore vera einir fimtan mans frá Pam Offshore Service. Ferðin frá Yantai til Singapore tekur umleið fjúrtan dagar. Pam Offshore hevði eisini umleið 20 mans við ti undanfarna pallinum Innovater, ta hesin i fjør sigldi ur Kina til Europa. So mikið væl hevur gingið við ti føroysku arbeiðsmegini, at Pam hevur gjørt avtalu um eisini hesaferð at hava folk umborð at gera pallin lidnan.